**Kári á Rógvi**
**løgtingsmaður**

**Løgtingsmál nr. 20/2011: Uppskot til løgtingslóg um áhugamál tingmanna**

# Uppskot
# til
# løgtingslóg um áhugamál tingmanna

## Kapittul 1
*Endamál og stovnan*

**§ 1.** Skipað verður skrá yvir áhugamál tingmanna. Skráin verður tøk á heimasíðu tingsins.
*Stk. 2.* Valdir løgtingsmenn, landsstýrismenn, fastir varamenn á tingi og aðrir varamenn á tingi skulu lata inn upplýsingar at seta í skránna. Løgtingsvalevni kunnu velja at vera við í skránni.

## Kapittul 2
*Leiðsla og fyrisiting*

**§ 2.** Løgtingsformaðurin situr fyri og hevur byrgdina av skránni.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin skipar skránna, ger vegleiðingarskriv og tekur støðu í ivamálum.

## Kapittul 3
*Upplýsingar í skrá*

**§ 3.** Persónur, tikin við í skránna, skal greiða frá hesum viðurskiftum:
a. hvørji størv, nevnd í stýrissskipanini § 8, viðkomandi røkir ella áður hevur røkt;
b. hvørji størv, nevnd í § 3 í løgtingslóg um samsýning og eftirløn, hann røkir ella hevur røkt, og nærri lýsa samsýning og setanarviðurskifti teirra;
c. hvørja skattskylduga inntøku hann hevur ella hevur havt seinastu 5 fíggjarárini og býta hana sundur á inntøku frá egnari vinnu, A-løn frá stovnum, fevndum av litra b, aðra A-løn frá inntøkum uttanlands og aðra inntøku og nærri lýsa skipan ella setanarviðurskifti í tí høpi;
d. hvørjar ognir hann eigur sjálvur ella saman við øðrum, serliga partabrøv, vinnuvirki, sethús og aðrar týðandi ognir;
e. hvørjum týðandi áhugafelagsskapum viðkomandi er limur í;
f. øðrum upplýsingum, hann metir týðandi í hesum høpi.

## Kapittul 4
*Átala, revsing og endurskoðan*

**§ 4.** Løgtingsformaðurin skal krevja tær nevndu upplýsingar og tryggja, at allir kravdir skrásettir persónar verða skrásettir. Vantandi skráseting ella upplýsing skal eftir hoyring átalast, í grovum førum og áhaldandi noktan við kunngerð á heimasíðu tingsins.
*Stk. 2.* Løgtingsformaðurin leggur árið eftir gildiskomu fram uppskot um endurskoðaðar reglur, harímillum revsiásetingar.

## Kapittul 5
*Gildiskoma*

**§ 5.** Lógin kemur í gildi á ólavsøku 2012.

**Viðmerkingar**
Lógin er grundað á tær misfatanir og gitingar, ið mangan standast um áhugamál tingmanna. Tingmenn hava skyldur at boða frá ávísum áhugamálum eftir stýrisskipan og samsýningarlóg, men hesar upplýsingar verða ikki savnaðar og kunngjørdar.

Hetta verður nú skipað í skrá, sum samanberast kann við aðrar skráir, ofta á enskum máli nevndar ”members’ interests” skráir.

*Til § 1*
Skipan verður stovnað. Í fyrstu atløgu koma tey 33 valdu tingfólkini (tingmenn sambært stýrisskipanarlógini), síðan landsstýrismenn, síðani tey, ið fast taka sæti á tingi, síðan varafólk í styttri tíðarskeið. Loksins kunnu fólk, ið bjóða seg fram sum tingfólk, skráseta seg til tess, at hesar upplýsingar, sum krevjast av tingmonnum, eisini eru kendar um tey.

*Til § 2*
Løgtingsformaðurin skal fyrisita skipanina.

*Til § 3*
Ásett verður, hvørjar upplýsingar skulu skrásetast.

*Til § 4*
Fyri fyrst verður ongin revsing ásett. Tó koma skyldurnar eyðvitað undir lóg um ábyrgd landsstýrisins. Heldur verður í fyrstu atløgu nýtt skipan, har tingformaðurin átalar brot á lógina. Grundað á royndir sínar at skipa skránna og átala brot, skal løgtingsformaðurin endurskoða lógina og eisini skjóta upp revsireglur.

*Til § 5*
Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 27. juli 2011**

Kári á Rógvi